# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit hava ov nógvar kvinnur her í Kina. Tær føða børn, og vit hava ovmikið av børnum*

*(Mao við Kissinger í 1973)*

# Eldur í Danmark



Eldsbrunarnir, sum byrjaðu á Nørrebro í Keypmannahavn fyrst í vikuni, breiða seg um landið. Síðstu nátt logaði í Keypmannahavn, Gladsaxe, Bagsværd, Kokkedal, Ishøj, Nivå, Greve, Farum, Slagelse, Ringsted og í Århus. Í flestu støðum settu ungfólk elda á ruskbingjur og annað, men nógvastaðni fóru fleiri bilar upp í royk. Í Bagsværd kom eldur í ein skúla, og løgreglan ivast ikki í, at hann var ásettur. Seks ungfólk vórðu tikin.



*Henry Kissinger í samrøðu við Mao formann (Mynd: AP)*

## Kissinger kundi fáa 10 mió. kinesiskar kvinnur

**Tað tilboðið fekk amerikanski uttanríkisráðharrin frá Mao. Kissinger lovaði at umhugsa tilboðið**

Í 1973 var táverandi amerikanski uttanríkisráðharrin, Henry Kissinger, í Beijing og tosaði við kinesiska leiðaran Mao um ymisk handilsviðurskifti landanna millum. Undir samráðingunum kom Mao við einum tilboði:

- Tygum vita, at Kina er eitt sera fátækt land. Vit hava ikki so nógv. Men tað er eitt, sum vit hava ov nógv av, og tað er kvinnur. So vilja tygum hava tær, kunnu vit lata tygum fáa nakrar túsund ella nakrar tíggjutúsund, segði Mao sambært einum skjali, sum hevur ligið í skjalagoymsluni hjá amerikanska uttanríkisráðnum, men sum almenningurin nú hevur fingið atgongd til.

Kissinger svaraði ikki beinanvegin, og nakrar minuttir seinni vendi Mao aftur til evnið:

- Vilja tygum hava okkara kvinnur? Vit kunnu senda tykkum tíggju milliónir, segði hann við amerikanska uttanríkisráðharran. Kissinger váttaði at hava fingið eitt betri tilboð, og Mao svaraði:

- Vit hava alt ov nógar kvinnur. Tær føða børn, og vit hava ov mong børn.

- Hetta tilboðið er so óvanligt, at vit noyðast at kanna tað gjølla, svaraði Kissinger sambært skjalinum.

## Njósnarafylgisveinur skal skjótast niður

**Ein amerikanskur fylgisveinur fer at detta niður á Jørðina í næstum, men amerikanararnir ætla at skjóta hann niður**

Sambært talsmanninum hjá amerikanska trygdarráðnum, Gordon Johndroe, er nógv av tí geiðslavirkna evninum hydrazin í fylgisveininum. Tað er vandamikið, og tí ætlar verjan at skjóta fylgisveinin niður, so hann ikki dettur niður í bygt øki.

Men tað er neyvan allur sannleikimn. BBC ceit at siga, at nógv sera loynilig útgerð er umborð á fylgisveininum, og at USA fer at gera alt til tess at forða fyri, at nakað annað land fær fatur á útgerðini. Málið verður mett so umráðandi, at tað var á borðinum hjá George W. Bush, forseta í síðstu viku, og sambært BBC tók forsetin avgerð um at skjóta fylgisveinin niður.

US193 varð sendur í ringrás um Jørðina í desembur í 2006, men longu stutt eftir mistu amerikanararnir ræðið á honum, tí ein telda umborð á fylgisveininum sveik.

Amerikanararnir rokna við, at fylgisveinurin fer at raka Jørðina í fyrstu viku í mars, men ætlanin er, at eitt herskip skal skjóta hann niður, áðrenn hann kemur inn í atmosferuna. Amerikanska verjan hevur eina serliga rakett til slíkar uppgávur.

*Ætlanin er, at eitt herskip skal senda eina rakett eftir US193 (Mynd: Reuters)*



## STUTT SAGT

### Uppsagnir á New York Times

Leiðslan á største blaðnum í USA, New York Times, hevur boðað frá, at 100 av stravsfólkunum verða søgd úr starvi í næstum. Leiðslan sigur, at í fyrsta umfari verður eingin settur í størv, sum eru leys, men at tað slepst neyvan undan beinleiðis uppsagnum. Grundgevingarnar fyri at skerja starvsfólkatalið er, at raksturin av pappírsútgávuni gevur ikki nóg gott úrslit, at inntøkurnar av lýsingum eru minkandi, og at tað kostar nógv at hava blaðfólk og myndafólk í Irak. Meiri enn 1.100 fólk arbeiða á tíðindadeildini hjá New York Times. Í fjør hevði blaðið góðar 200 mió. dollarar í avlopi.

### Óheppið met

Tað gongur syndarliga illa í afrikanska landinum Zimbabwe. Í desembur setti landið met, sum tó má sigast at vera eitt av teimum, sum fáur man rósa sær av, tí sambært landsins hagstovu kom inflasjónin upp á 66.212,3 prosent tann mánaðin, og tað er met. Í novembur var inflasjónin "bara" 26.470,0 prosent. Hagfrøðingar siga, at í roynd og veru er inflasjónin størri, enn hesi tølini siga. Zimbabwiski dollarin hevur nú so lítið virði, at lands bankin hevur givið boð um at prenta seðlar, sum eru 500.000 og 750.000 dollarar. Eitt prísdømi er, at ein vanligur búffur kostar fimm mió. dollarar.

### Uppreistrarmaður skotin

Bretska tíðindastovan Reuters veit at siga, at ein av høvuðsmonnunum aftan fyri mótmælini í Burma seinasta heyst, La Phan, varð skotin í heimi sínum í Teilandi í gjár. Kona hansara sigur við Reuters, at nakrir ókendir menn lupu á hús teirra og skutu mann hennara. Hann doyði á staðnum. Viðhaldsmenn hansara boðaðu seinni frá, at teir ivast ikki í, at tað var hernaðarstýrið, sum sendi menninar at fremja morðið.